

*Tá tey vóru fimm systkin. Aftast f.v.: Jógvan og og Jákup. Framman fyri f.v.: John, Absalon og Solborg*



*Astrid og Jógvan við børnum. Aftast f.v.: Jákup, Øssur og Jens Christian. Fremst f.v.: Astrid, Henny og Jógvan*

komin í gongd. »Alt dugir til redningsbát«, var mangan havt á lofti tá á døgum, og lýsir hetta hugburðin tá.

Eg var ikki errin, tá ið vit fóru úr Haraldsundi suður fyri bjørg og til Havnar við sandi á lágætt. Tað ráddi um at hava so nógv í, sum báturin kundi føra, tí hvør króna taldi. Roknskapurin hjá okkum var tá hond í hond, og eg minnist aldri nakra rokning í samband við henda sandfiskiskap. Í mín lumma kom so einki oyra, men vit fingu føði og klæði, og so vóru vit nøgd.

Havnarmenn roknaðu sandin í tunnum, meðan vit her norðuri roknaðu í tonsum.

Ofta var tvassut í sjónum suður eftir. Mær dámdi hetta einki, at dekkið lá væl undir í sjógvi, tá vit loystu úr Haraldssundi. Tað setti tó skjótt úr tí váta sandinum, so báturin lætnaði væl suður eftir. Men, men!

Í góðveðri varð lúkan ikki løgd á, men í staðin var roki fyltur upp um lúkukarmarnar. Karmarnir vóru so høgir, at teir rukku nærum at lúnningina. Til Havnar mundu vit hava um 25 tons í bátinum, meðan vit annars vanliga høvdu 30 tons.

Polaris var tiltikin at rulla illa. Eg var so ringur av sjóverki, at tá pápi purraði út onkun morgun, og eg hoyrdi á takvindeyganum, at hann kyldi lágt, og vit skuldu til Havnar, so vendist alt innan í mær.

Nei, hetta var ikki eg. Og onkuntíð minnist eg, at eg græt, men har var einki at gera. Men hetta lat eg sjálvandi ongantíð nakran vita.

Men eg visti eisini, at hetta var tað, ið kravdist fyri at lívbjarga sær, um tú ikki skuldi til skips. Og Suðurlandið! Nei, tað helt eg hevði verið tann vissi deyði.

Tað, eg veit, var eingin sandbátur í Føroyum tá. Onkur danskur kanska var, men teir arbeiddu við at gera havnir. Og so var tað onkur, sum førdi sand við motori, men tað var bert til sín sjálvs ella so.

## Teir góðu dagarnir

Men so hitt, tað góða. Teir góðu dagarnir. Eina heila viku í Sundalagnum sunnanvert Breiðá, har Sandoyra, (kanska teir kallaðu tað Breiðasand) var so stórt, at byrsumál rakk ikki av bakkanum og út á sandkantin á sjóarmálanum.

Nú sigst eingin pirra at vera eftir……

Tað gekk bert ein tími ella so at fylla bátin. Hetta var áarsandur, sum mest sum rann av sær sjálvum upp í tunnuna, sum varð nýtt at hiva sandin umborð. Her var stórur munur á við sjóarsandinum í Haraldsundi, sum kundi vera harður sum eyrur. Á sama hátt, tá vit komu til Havnar. Hetta var sum kavi at lempa úr lastini aftur ímóti sandinum úr Haraldssundi.

Kona Karl á Lag var abbasystur okkara, og har skortaði ikki gestablídni.

Karl á Lag kom oman við hvørt at leska okkum, og ofta deildi hann pápa, so illa helt hann, at pápi fór við okkum, tá vit skumpaðu úr lastini. Men hetta kendust vit einki við. Vit vóru ikki vanir við annað enn hetta lívið. Kvísl, haka og spaka mundu vit nokk duga at brúka, áðrenn vit dugdu at siga, hvussu tað æt. Serliga kvísl, minnist eg onkur av okkum høvdu trupulleikar av at siga.



*Við trolaranum Jóannes Paturson. Á brúnni Benni (v.m.) og Jákup Oluf á Lakjuni*

## Eingin grabbi

Eingin grabbi var uppfunnin tá. Ikki her í hvussu er. So kundi Karl á Lag senda Diaba ella Jákup, son sín, at hjálpa okkum. Teir vóru í bestu árum og sera raskir. Mest var tað Jákup, ið hjálpti til. Eg haldi Diaba var burtur nógvu tíðina.

Vit førdu allan sandin til tað, tey kallaðu »Stóra húsið« hjá Karl á Lag úti við Strond. Frits í Króki koyrdi. Hann hevði ein Ford 1½ tons. Haldi ikki hann hevði gearstong, bert pedalir. Jú, har var lív og góðir dagar. Veit ikki hvat entreprenørarnir høvdu sagt í dag til bert at havt ein bil at tøma lastina við. Eisini mátti Frits skumpa sandin av aftur lastini við spaka. Við hvørt fóru vit við, og kundu so eisini hjálpa til at tøma bilin, eisini fyri skjótari at koma aftur í Sundalagið, ella, fyri ikki at tala um, um vit skuldu heim til Klaksvíkar aftur. Um næturnar lógu vit á Kollafirði.

Eg tosaði við Kaj, son Frits, fyri at vita, um hetta ikki mundi vera á leið, tað eg havi skrivað um pápa sín. Jú, tað helt hann.

Eg meini, at bilur var kvennkyn tá í Havn, men havi ikki fingið hetta prógvað og heldur ikki mintist Kaj nakað um tað. So tað fer at standa ósvarað enn.

## Við Geytabrúnna

Pápi gjørdi nógv burtur úr, at vit skuldu hava tað gott til matna. Tað var ikki smávegis hann vartaði upp við í lugarinum, tá ið hann kom oman aftur úr handlinum hjá Geytakristian.

Har kom eisini Martinius úr Kollafirði í lugarið at vitja. Hann var tiltikin frásøgumaður frá uttanlandssigling við hesum risastóru skonnartum, sum kundu vera í sjónum í fleiri mánaðir. Alt tað har hendi, og tað hann upplivdi, var ein onnur verð fyri meg, bæði uppá ilt og gott.

Hesar dagarnar vit lógu í Sundalagnum kom nógv í kassan. Hetta var rokfiskiskapur.

Eg minnist eisini dagarnar til útoyggjarnar við góðsi og ferðafólki. Hetta er frá 1930 til 1933. Veit ikki, um nakar uttan teir føstu ferðabátarnir hjá tí almenna og so mjókabáturin sigldi tá. Í hvussu er ikki til útoyggjarnar, tað eg veit.

Her vóru vit onkrar túrar hjá Fyr- og Vagervæsenet út til vitarnar.

Eg minnist ein dýrdardag úti við Hólmin í Mikinesi við koli, gassfløskum, olju og øðrum vørum. Hetta varð hivað upp við krana. Lógu har meginpartin av degnum og lossaðu. Tá liðugt var, róptu teir okkum um at koma inn á Gjónna. Har fingu vit fyltar lundar. Eg gloymi aldri henda dýrdardag. Minnist, tá vit sigldu fram við landinum, at ein maður gekk oman brekkuna. Haldi teir kalla tað »í Lamba«. Tað var sum